DEKKMASTER.FO

...tá ið prísurin eisini er avgerandi!

**Vetrardekk**




**Goodyear Ultra Grip 7+**

**Prísdømi:**
195/65-15.......... **980,-**
205/55-16 ...... **1.375,-**




**Continental TS830**

**Prísdømi:**
195/65-15.......... **990,-**
205/55-16 ...... **1.290,-**

**Komplet vetrarhjól**
**– 15" ella 16" felgur við vetrardekkum**



**15" felgur við TS830**
**Kr. 6.900,- fyri settið**
Dekkstødd: 195/65-15
Felgurnar fáast til flestu bilmerki



**16" felgur við TS830**
**Kr. 8.400,- fyri settið**
Dekkstødd: 205/55-16
Felgurnar fáast til flestu bilmerki

www.dekkmaster.fo
info@dekkmaster.fo
telefon 227 000



fk **Matseðil**

Hósdagin 30. oktober
**Hamburgaryggur / Hakkibúffur**

Fríggjadagin 31. oktober
**Lasagna / Spariribs**

Leygardagin 1. november
**Rullusteik**

Mánadagin 3. november
**Kókað neytakjøt / Fiskafrikadellur**

Týsdagin 4. november
**Grýturættur / Stoktur medistari**

Mikudagin 5. november
**Fatkotelettir / Stoktur fiskur**

*Til ber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**



**Køkurin er opin**
hvønn gerandisdag til kl. 22.30 og í vikuskiftinum til kl. 23.00.

RIO BRAVO RESTAURANT

Tórsgøta 11
Tel. 31 97 67
www.riobravo.fo









**VW Golf 2.0 TDI Sportline** við 140 hk. Bilurin er frá 24/4-06. Hevur koyrt 18.000 km. Nógva eykaútgerð, t.d: DK-pakki við klima, RCD 500 anlegg við 10 hátalarum, metallakk, leðurróður, multifunktiónsanlegg plus, tokulyktir, ljós + sjón pakki, o.a.

Nýprísur: kr. 350.000,-

**Prísuppskot kr. 250.000,-**

**Ring 510 298 ella 210 298**



Leygarkvøldið 1. nov. góður dansur við
**CONTINUE**
Ein partur av manningini úr DRIV
Ókeypis atgongd áðrenn midnátt

Fríggjakvøldið 31. okt. kl. 19.00
**BINGO**
Høvuðsvinningur: ræst krov

Opið er:
Mán. - Hós. ..... 19.00 - 24.00
Frí. - Leyg........ 17.00 - 04.00
Sunnudag........ 17.00 - 24.00

Tórshøll

Felagið Tórshøll Sverrisgøta 22 FO-100 Tórshavn Tlf. 311565


# Býráðsvalið 2008

Boðað verður frá, at býráðsvalið 11. november 2008 verður frá

**kl. 10.00-20.00**

**Valt verður soleiðis:**

1. Fólk í Havn, Norðradali, Hoyvík og Koltri, á Hvítanesi og Sundi velja í ítróttarhøllini á Hálsi
2. Fólk á Argjum velja í róðrarneystinum á Argjum
3. Fólk í Kaldbak og Kaldbaksbotni velja í skúlanum í Kaldbak
4. Fólk í Kollafirði velja í skótahúsinum í Kollafirði
5. Fólk í Kirkjubø,Velbastað og Syðradali velja í skúlanum á Velbastað
6. Fólk í Hesti velja í bygdarstovuni í Hesti
7. Fólk í Nólsoy velja í felagshúsunum hjá Ungmannafelagnum Royndini í Nólsoy

Vart verður gjørt við, at valrætt til býráðsvalið hava tey, sum

a. hava fylt 18 ár og annars lúka treytirnar fyri valrætti og valbæri til Føroya løgting.
b. standa í fólkayvirlitinum í Tórshavn í seinasta lagi 2 vikur fyri valdagin.

Ríkisborgarar úr hinum norðanlondum kunnu, hóast teir ikki eru valbærir til Føroya løgting, velja til kommunuval um so er, at teir hava havt fastan bústað í Føroyum seinastu 3 árini undan valinum.

Bert tey, sum standa á vallistanum, sleppa at velja.

Um onkur er komin á vallistan, sum ikki longur býr í kommununi, sleppur viðkomandi ikki at velja.

Eisini verður boðað frá, at valkort til býráðsvalið eru send teimum, ið standa á vallistanum. Um veljari hevur ikki fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal sum skjótast boðast Snarskivuni frá hesum.

Harumframt verður boðað frá, at veljarar, ið sambært vallógini lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða í snarskivuni.

Sjófólk, sjúk og onnur, sum ikki kunnu koma á valstaðin, kunnu boða frá á snarskivuni, tlf. 30 20 10, sum er opin vanliga dagar frá kl. 9.00-16.00, tó hósdag til kl. 18.00.

Í seinasta lagi mánadagin 10. november 2008, kvøldið fyri valið, kunnu brævatkvøður eisini greiðast á snarskivuni kl. 16.00-22.00.

**Valnevnd Tórshavnar býráðs**

**Tórshavnar kommuna**